# Atlantic Margine Group ein sterkur oljubólkur

Tey trý oljufeløgini Statoil, Enterprise og Mobil kunngjørdu á tíðindafundi týsdagin, at tey hava skapt eitt sterkt samstarv í sambandi við oljukanningar av havbotninum við Føroyar. Atlantic Margine Group ætlar at keypa seismisku mátingarnar av føroyska landgrunninum frá Western Geophysical Corporation.

DIA MIDJORD

Atlantic Margine Group ætlar at fáa hendur á og tulka tilfarið frá seismisku kanningunum sum Western gjørdi á føroyska landgrunninum fyrr í ár. Hetta varð upplýst fyri fjølmiðlunum týsdagin.

Kortini var ikki so nógv nýtt at heinta. Fyri kortum var væl mannað lið frá Statoil í Føroyum og vitjaði. Tá fingu fjølmiðlafólk í ríkiligt mát at hoyra um oljuboringar við Føroyar.

Hesaferð vóru nakrir av somu Statoil-monnum við. Men teimum við lið vóru eisini umboð fyri bretska felagið Enterprise Oil PLC og Mobil Nort Sea Limited.

Hesir fingu so eisini høvi týsdagin at hitta føroysk fjølmiðlafólk, og siga teimum eitt sindur um teirra fyritøku og greiða frá sjónarmiðunum í samstarvinum, Atlantic Margine Group.

Umboðini vístu á, at hóast tey eru gingin saman í samstarv, so er møguleikin fyri einum vónbroti eins stórur, sum tá nýggj útjaðaraøkið verða kannað. Men gerast vónirnar veruleiki, og tað høvdu øll trý feløgini góða vónir um, so vilja tey trý oljufeløgini - norska Statoil, bretska Enterpris og amerikanska Mobil - brúka mest framkomnu tøknifrøðina og royndir higartil at menna føroysk oljuøki á ein tryggan, umhvørvisvinarligan og lønandi hátt.

Atlantic Margine Group hevur eisini játtað at stuðla tiltakinum hjá Biofar. Fyrst í komandi ári er ætlanin at skráseta og kanna alt djóra- og plantulív í havinum kring Føroyar. Hetta er gjørt á djúpum vatni, men nú skal eisini kannast heilt inn til lands.

Hetta verður gjørt í sambandi við møguligar broytingar, tá oljuvinnan hevur virkað eina tíð.

Tey trý oljufeløgini siga annars, at tey við sínum samarbeiði kunnu skapa virðir og eina nýggja framtíð fyri Føroyar.

So er bert hjá okkum føroyingum at vóna, at hesin bjarti spádómur fer at hepnast eins væl og dapri spádómurin hjá Ráðgevandi nevndini fyrst í áttatiárunum.



Umboð fyri kommunurnar í umhvørvisverndarsamtakinum KIMO. Í miðjuni Jürgen Thomaneck, formaður. Honum við lið (h.m.) Jógvan K. Mørkøre, ið umboðar Føroya Kommunufelag

# Blokkstuðul uppá 826,1 mió. kr. næsta ár

Uppskotið um danska blokkstuðulin skal samtykkjast í Løgtinginum, áðrenn tað kemur til 3. viðgerð í Fólkatinginum. Undir donsku 1. viðgerðini tóku fólkatingslimirnir sum heild væl undir við uppskotinum.

BEATE L. JENSEN

Týsdagin legði landstýrismaðurin við fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard, í løgtinginum fram uppskot til samtyktar. Og var hetta mál viðvíkjandi blokkstuðlinum, sum danir lata føroyingum komandi ár.

Eftir sum hetta er ein donsk lóg, ið Fólkatingið setur í gildi fyri Føroyar, skal hon sambært heimastýrislógina eisini góðtakast av einum meiriluta í løgtinginum fyri at koma í gildi.

Blokkstuðulin fyri komandi ár ljóðar uppá tilsamans 843,4 mió. kr., sum er lítið sindur meiri enn tann blokkstuðul, ið veittur var okkum í ár, 826,1 mió. kr.

At upphæddin er lítið sindur hægri fyri komandi ár kemst av, at prístalsreguleringar eru gjørdar. Annars er blokkstuðulin hin sami í 1995 sum í ár.

### Umlagt til heildarveiting

Samstundis sum uppskotið viðvíkjandi blokkstuðlinum var lagt fyri Tingið, kom tað til 1. viðgerð í Fólkatinginum týsdagin, har fólkatingslimirnir sum heild vóru samdir um at góðtaka uppskotið.

Stjórnin hevur ætlan um, at blokkstuðulin fyrst skal góðtakast av løgtinginum, áðrenn málið fer til 3. viðgerð í Fólkatinginum.

Í 1987 var ein partur av ríkisstudninginum, ætlaður til almannamál, heilsumál og skúlamál, umlagdur til eina heildarveiting.

### Avtalan broytast 1996

1. juli í fjør var allur stuðulin til nevndu økir veittur sum ein heildarveiting, galdandi árið út.

Bæði landsstýrið og danska stjórnin hava annars í felag boðað frá, at samráðingar mugu vera um eina nýggja blokkstuðulsavtalu, sum sett skal vera í gildi á nýggjárinum 1996.

Í tí sambandinum er álagt landsstýrinum at gera nøkur uppskot til nýggju skipanina, ið hevur við broytingina av blokkstuðulinum næstu ferð at gera.

Hetta arbeiðið skal gerast skjótast gjørligt.

# Føroyskar kommunur luttaka í fleirtjóða umhvørvisvernd

PÓL Á KLETTI

Føroya Kommunufelag umboðar føroyskar kommunur í KIMO (Kommunenes Internasjonale Miljøorganisasjon), sum norskar kommunur í Suðurnoregi hava tikið stig til til tess at verja serliga útjaðaraøki móti náttúrudálking av ymsum slag og seta tilbúgvingarskipanir í verk um vanlukkur henda.

Í KIMO eru kommunur í Skotlandi, Hetlandi, Norðurtýsklandi, Danmark, Svøríki, Føroyum og Noregi. Stýrislimir eru: Jonathan Wills, Shetland Islands Council, Hetlandi, Jürgen Thomaneck, Grampian Regional Council, Aberdeen (hann er formaður í KIMO), Darrel Backworth, North Humberside, Aberdeen, Flemming Bay Jensen, Esbjerg, Volkert Dethlefsen, Husum, Týsklandi, Björn Stahre, Bosam, Uddevalla, Svøríki, Jógvan K. Mørkøre, Føroya Kommunufelag, og Leif Måsvær, Stavanger, Noregi.

Jógvan K. Mørkøre, sum umboðar Føroya Kommunufelag í KIMO sigur, at hetta er alt kommunur, ið hava Norðsjógvin sum granna. Og orsøkin til, at tær hava tikið hetta stigið er, at tær ásanna, at tað er ikki nóg mikið, at ein á stjórnarstøði ger samtyktir um náttúruvernd og tiltøk móti havdálking við eitt nú MARPOL-konventiónini.

Kommunurnar siga seg við hesum samtaki hava uppfylt nakrar ásetingar í MARPOL-sáttmálanum um fyribyrgjandi tiltøk.

Úr Kattegat rekur nógv órudd inn á svensku strendurnar. Sviar hava stórarbeiði í gongd at rudda hesar strandaleiðir. Sviar upplýsa í KIMO um teirra royndir, og tað kunnu so hinar limakommunurnar læra nakað av.

Og nú frálandavinnan nærkast alt meira higar er neyðugt, at vit búgva okkum til neyðug verndartiltøk.

– Tað eru smáu útjaðaraøkini og teirra náttúra og djóralív, ið eru eina mest hótt av kjarnorkuverkum sum Dounreay og oljudálking – hvør minnist ikki vanlukkuna tá Braer fór á land í Hetlandi og olja lak úr skipinum og dálkaði sjógv og strendur, sigur Jógvan K. Mørkøre.

Hinar kommunurnar, ið umboðaðar eru í KIMO eru fegnar um at hava Føroyar við í hesum umhvørvisverndarsamstarvinum, tí vit liggja í miðjum Norðsjógvi, Jógvan Mørkøre sigur, at hugsað verður um eisini at fáa Írland og Ísland við í samstarvið, sjálvt um hesi londini ikki liggja í sjálvum meldrinum, men so verður ikki farið longri.


